# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BLOKKPOLITIKK – JA TAKK



Jóannes Eidesgaard reisti á landsfundi hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið spurningin, um tíðin ikki er komin har til í Føroyum, at vit fara yvir til blokkpolitikk.

Hetta er ein ógvuliga áhugaverdur spurningur, javnaðarleiðarin reisir. Í øðrum londum merkir blokkpolitikkur, at tú frammanundan valinum veitst, hvørja stjórn tú fært, um tú velur hendan ella handan flokkin. Í Danmark vita fólk nú - sambært veljarakanningum altso - at tey fáa eina javnaðarstjórn, og at Helle Thorning Schmidt verður forsætisráðharri. Men eitt ár er eftir til valið, so tað kann venda aftur, og so vita fólk, at Lars Løkke Rasmussen verður forsætisráðharri, um stjórnin verður borgarlig.

Í Føroyum hava vit onga hóming um slík viðurskifti, fyrr enn eftir eitt mangan drúgvt samráðingarumfar á Gamla Apoteki *eftir valið.* Og tað kann enda við teimum løgnastu samansetingunum. Allir flokkar hava samstarvað so ella so. Taka vit landsins stýri í dag, so er tað sett saman av einum borgarligum konservativum loysingarflokkin, einum borgarligum liberalum sambandsflokki og einum vinstravendum Javnaðarflokki, sum vil varðveita ríkisfelagsskapin við Danmark.

Meðan Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava samstarvað væl politiskt, so klára teir illa upp saman. Politiska svarið upp á tað er helst, at Tjóðveldisflokkurin er meira loysingarflokkur enn ein politiskur flokkur á vinstraveginum.

Ein stórur partur av føroyingum halda, at vit skulu fáa greiði á ríkisrættarligu støðuni, áðrenn vit fara at arbeiða við vanligum politikki – har vit gera av, hvussu samfelagsgóðarnir skulu býtast. Soleiðis hava vit stríðst í góð hundrað ár, og enn hava fólk sum heild ikki fatað tað, at føroyingar flestir vilja varðveita ríkisfelagsskapin við Danmark. Hóast summi halda fast um eina fløkta 64 ára gamla fólkaatkvøðu, so hava øll løgtingsval síðani – og allar landsstýrissamgongur víst, at vit vilja varðveita ríkisfelagsskapin.

Jú, tað hevði heilt víst verið áhugavert við blokkpolitikki í Føroyum. Sjúrður Skaale, tingmaður, hevur víst á tað sama herfyri.

Kritiski spurningurin til Jóannes Eidesgaard eigur tí at verða, hvørjar flokkar hann fer at peikað sær í sín blokk. Valla teljast samgongufelagarnir í Tinganesi teirra millum. Vit kundu skotið upp á Tjóðveldi og Miðflokkin – og so kanska Sjálvstýri, sum eisini kann fella í borgarligu leguna. Men blokkpolitikkur krevur, at vit hava veruligar flokkar, sum duga at arbeiða politiskt, og sum duga at planleggja. Tað krevur nakað av flokkunum, men hevði gagnað fólkaræðinum.

## Hvønn vil Eidesgaard so hava í blokkin hjá sær?

# Parkeringsplássini hvørva

Sum vit fleiri ferðir hava víst á her, so hevur Tórshavnar Býráð – við borgarstjóranum á odda – okkurt ímóti, at fólk parkera bilar í miðbýnum.

Býráðið hevur sum kunnugt tikið burtur fleiri parkeringspláss í miðbýnum seinastu tíðina, og nú býráðið hevur selt parkeringsplássið í Tórsgøtu til Tryggingarfelagið Føroyar at byggja hotel á, so hvørva enn fleiri parkeringspláss.

- Parkeringsplássini mugu víkja. Vit hava nógv onnur parkeringspláss at vísa á. Vit skulu ikki hava so nógvar bilar í býnum, vit hava eina fína ókeypis bussleið, so tað er ikki neyðugt við øllum bilunum, segði Heðin Mortensen við útvarpið.

Men góði borgarstjóri:

Hatta er ikki gott nokk. Stórur tørvur er á parkeringsplássum í miðbýnum, eisini stutttíðarparkeringsplássum. Tað handilslív, sum enn livir í miðbýnum, klárar seg ikki uttan parkeringspláss. Tak til dømis SMS, man tað bara vera til stuttleika, at SMS hevur bygt landsins størsta innandura parkeringspláss?

Tað er gott, at býráðið nørir um mentanina í Miðbýnum, og bæriliga ætlanin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar at byggja út Hotel Tórshavn er heilt víst áhugaverd, men borgarstjórnin má vísa ein betri vilja mótvegis bilferðslu í miðbýnumm.

# Tjóðveldi fær ikki mannað lið

*»...Hetta kann vera prísurin, tá ið mann velur at verða professionellur maratonrennari ístaðin fyri at vera professionellur tingmaður - og eingin ger nakað við tað. Harvið er tað hent, at málið nú kemur til viðgerðar...«*

Hesi orðini eigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður hjá Tjóðveldi. Og tey fullu eftir at løgtingið fríggjadagin gjørdi av, at ganga ímóti tilmælinum hjá umsitingini í Løgtinginum og formansskapinum um at burturvísa málið um at skipa ein privatan grunn at yvirtaka útreiðslurnar, sum landskassin higartil hevur havt av minstulønini.

Tað marghháttliga við hesum er, at Tjóðveldi enn einaferð ikki fekk mannað lið. Í vár setti flokkurin fram misálit á løgmann, men tá atkvøðast skuldi, mangladu tveir tingmenn hjá Tjóðveldinum.

Og fríggjadagin var sama skilið. Orsøkin er, at Sjúrður Skaale og Bjørt Samuelsen eru farin til New York at renna marathon. Tey hava ikki biðið sær frí frá tingararbeiðinum, so Páll á Reynatúgvu og Heidi Petersen kundu møta í teirra stað.

Løgið, at Sjúrður Skaale ger slíkt, tí hann hevur sjálvur víst á, hvussu óræættvíst tað til dømis er, at løgtingsmenn eisini eru fólkatingsmenn. Kanska er orsøkin tann, at tingmanningin hjá Tjóðveldinum ikki orkar fyri Páll á Reynatúgvu...



Men seriøsur andstøðupolitikkur, tað er tað so í øllum førum ikki.



## Væl skipað fíggjarætlan

HEÐIN MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 14



## Nærkast vit kommunismu

JÓGVAN VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 31

# Mugu hava eitt mótspæl



Í grein í Vikuskifti fríggjadagin var bland komin í uppsetingina, so at viðmerkingin hjá Jákup Sverra Kass um grindadrápið ikki kom við. Í staðin var viðmerkingin hjá Ólavi Sjúrðaberg av misgávum eisini prentað undir yvirskriftini hjá Jákup Sverra Kass. Her er tað, sum Jákup Sverri hevði at siga um málið:

Okkara støða í grindamálinum hevur verið alt ov defensiv. Vit mugu hava eitt mótspæl til umhvørvisfelagsskaparnar, og tað skal fyrst og fremst koma frá Uttanríkisráðnum.

Vit eiga at leggja dent á tríggjar lutir í okkara mótspæli. Vit mugu vísa á, at stovnurin av grindahvalum er ikki hóttur, at grindadrápið er ein føroyskur mentanararvur, og at drápið verður gjørt so gott og skjótt sum gjørligt. Vit mugu eisini tora at hyggja at skipanini kring grindadrápið - lúka tær vánaligu hvalvágirnar frá, og til dømis lata roynd fólk skera á háls. So leingi sum ein meiriluti av føroyingum er fyri grindadrápi, so kunnu vit ikki steðga tí. Men hinvegin vil eg siga, at tað skal vera ein meiriluti fyri grindadrápinum, annars eiga vit at gevast.

Vit mugu leggja eina ætlan fram til næsta summar, tí vit kunnu ikki seta okkum afturá, lata sum luft og verða fornermað inn á altjóða fjølmiðlar.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*